Álit

í

løgtingsmáli nr. 97/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (CRS og CARF – globalir standardar fyri umbýti av fíggjarligum upplýsingum millum skattamyndugleikar)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 28. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð 7. mai 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. og 13. mai 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, saman við TAKS.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

OECD hevur gjørt ein altjóða standard, nevndur CARF (Crypto-Asset Reporting Framework), sum skal tryggja gjøgnumskygni og sjálvvirkandi fráboðanir um handlar, ið verða gjørdir við kryptoognum. Hetta skal geva skattamyndugleikum kring allan heimin eitt betri yvirlit yvir, hvat fólk og fyritøkur eiga og vinna við krypto, so skattlig viðurskifti kunnu viðgerast rætt.

Um Føroyar seta CARF-skipanina í verk, fer tað at verða møguligt at lata og móttaka upplýsingar frá øðrum londum, sum eru partur av CARF-skipanini.

OECD hevur somuleiðis gjørt nakrar broytingar í CRS (Common Reporting Standard). Hetta er skipanin, sum gevur upplýsingar um "vanligar fíggjarognir" uttanlands. Tann týdningarmesta broytingin í tí partinum skal tryggja, at ávísar e-peningavørur verða fevndar av virkisøkinum hjá CRS.

Við at samtykkja lógaruppskotið gevur Løgtingið samtykki til, at landsstýrið kann taka tey neyðugu stigini fyri at seta CARF og broytingarnar í CRS í verk.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 15. mai 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	